Mál

Í tráð við umhvørvispolitikkin hevur IRF sett bæði langtíðar- og stutttíðarmál.

Langtíðarmál (2030):

- IRF skal endurvinna 50%, brenna 47% og tyrva 3% av burturkastinum í 2030
- CO2-útlátið skal minka við 25% í 2030 við støði í 2023 tølum.
- Øll avlopsorkan hjá IRF skal endurnýtast í 2030
- Í 2030 eru varandi orkukeldur á øllum støðum.

Stutttíðarmál (2025/26):

- Betra um frávíksskipanina – fáa øll starvsfólk og allar deildir við.
- Samstarva við kommunur og havnir um at betra um skiljingina
- Endurvinna glas og keramikk í Føroyum

Her kanst tú síggja eina samanumtøku av málunum fyri 2024